Formaðurin í donsku ferðsluskaðanevndini:

# Góð úrslit at vísa á

**– Vit hava fingið løgregluna at broyta arbeiðsmynstur, fólkatingslimir at broyta onkrar ferðslulógir, vegamyndugleikar at broyta onkrar vegir, vanlukkurnar eru fækkaðar við 40% o.s.fr. Tað hevur avgjørt havt ávirkan at hava eina skaðanevnd, sigur Sven Krarup Nielsen, formaður í donsku skaðanevndini**

FERÐSLUTRYGD
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Talið á ferðsluvanlukkum er follið við 40% seinastu árini, so tað er heilt víst, at arbeiðið hjá skaðanevndini ger ein mun, staðfestir Sven Krarup Nielsen, formaður í donsku ferðsluskaðanevndini. Hósdagin helt hann ein fyrilestur um arbeiðið.*
*Mynd Jens Kr. Vang*

Í donsku skaðanevndini sita fólk, ið á ein ella annan hátt eru tengd at ferðsluvanlukkum. Fólk frá vegamyndugleikunum, ein lækni, ein sálarfrøðingur, limir frá løgregluni, fólk frá bileftirlitinum og vegaverkfrøðingar.

Danska ferðsluskaðanevndin verður boðsend um álvarsamar vanlukkur henda, t.v.s. um í minsta lagi eitt fólk verður innlagt á sjúkrahús.

### Tað ger mun

– Higartil hava vit hava gjørt ymiskan statistik yvir vanlukkurnar, m.a. kunnu vit staðfesta at nógvir av teimum bilførarunum, sum verða raktir av vanlukkum, eru fólk, sum frammanudan eru kend av løgregluni, greiðir Sven Krarup Nielsen frá.

Skaðanevndin hevur higartil bólkað arbeiðið í trý. Vanlukkur á motorvegum, vanlukkur við ungum undir 25 ár og vanlukkur við stórum vøruvognum. Higartil eru tvær umfatandi rapportir komnar út, og tann triðja er í løtuni til prentingar.

– Tað er heilt víst, at arbeiðið, sum vit higartil hava gjørt, hevur gjørt ein stóran mun á donsku vegunum. Vit hava fingið reist eitt kjak í fólkatinginum um neyðugar broytingar av ferðslulógini og koyrikortinum, ferðslulógin er nú broytt, og vit hava fingið vegamyndugleikarnar at broyta nøkur vegastrekki, sum vórðu staðfest at vera serliga vandamikil, greiðir Sven Krarup Nielsen frá.

Víðari sigur hann, at nevndin eisini hevur fingið løgregluna meiri út á vegirnar um næturnar og um vikuskifti, tá flestar vanlukkur henda ímillum tey ungu. Eisini hava teir fingið myndugleikarnar at beina fyri vandamiklum deyðsfellum framvið vegunum, m.a. trøðum.

– Okkara málsetningur var, at tølini fyri ferðsluvanlukkur skuldu dala við 40%. Tað málið er nú nátt, og vit eru enntá komin undir tað. Við at finna útav øllum smálutunum í sambandi við hvørja vanlukku sær, hava vit fingið nakrar góðar linjur at arbeiða eftir, fyri at bøta um trygdina á vegunum, sigur Sven Krarup Nielsen.

### Tá vanlukkur henda

Tað, sum nevndin ger tá vanlukkur henda, er í fyrsta lagi at skunda sær út á vanlukkustaðið og kanna hvat er hent. Bæði hvat hendi tímarnar áðrenn vanlukkuna, hvat hendi sekundini beint frammanundan, hvat hendi undir sjálvari vanlukkuni og at enda verður eisini kannað hvat hendir eftir vanlukkuna.

Kanningarnar umfata allar síður av vanlukkuni.

Læknin ger kanningar av tí skadda ella deyða, soleiðis, at tað kann staðfestast júst hvat tað var, sum voldi meinið.

Sálarfrøðingurin tosar við tann skadda, tey sum møguliga vórðu við í bilinum og vitnir annars. Eisini tey, sum tann skaddi kendi væl og tey, sum hann seinast tosaði við. Hetta gevur virðismiklar upplýsingar um sinnisstøðu, persónligheit o.a. hjá førarinum.

Fólk frá bileftirlitinum kanna bilin. Á tann hátt ber til at síggja júst hvussu vanlukkan er hend, hvar bilurin hevur tikið fyrst o.s.fr.

Bremsuspor– og longd verða máld. Hetta gevur ábendingar um ferð og rætning, tá vanlukkan hendi.

Verkfrøðingar kanna vegstrekkið har vanlukkan hendi. Er tað eitt vandamikið sving har á leiðini, vantandi autoverja ella annað vegtekniskt, sum kann hava havt ávirkan á vanlukkuna, og sum kann broytast at forða fyri fleiri vanlukkum?

M.a. alt hetta verður tikið við í kanningina av einstøku vanlukkuni ella ólukkuni. Harafturat koma so politirapportir og rættaravgerðir, ið so fall, at tær eru frá hondum greiddar áðrenn rapportin frá skaðanevndini.

### Álítandi tøl

– Allir upplýsingar, sum vit savna í sambandi við eina vanlukku, verða avgreiddir í trúnaði. Sjálvt ikki løgreglan fær nakað at vita av tí, sum vit t.d. hoyra frá vitnunum. Tað, vit gera, er at savna allar upplýsingarnar frá øllum vanlukkunum og síðani gera vit tøl og statistikk. Tá fólk tosa í trúnaði, tora tey betur at siga frá, júst hvat tað var sum hendi, staðfestir Sven Krarup Nielsen.

Tí eru úrslitini av kanningunum eisini sera eftirfarandi.

Spurdur hvat tað kostar at reka donsku skaðanevndina, svarar formaðurin, at í Danmark eru 8 ársverk sett av til arbeiðið. Umframt tað, kemur so nakað av rakstrarkostnaði, m.a. ein vælútgjørdur bilur.

– Eg skal ikki siga um tit eiga at seta eina slíka nevnd á stovn ella ikki. Men eg kann bara vísa á, hvussu væl hon hevur hjálpt hjá okkum, staðfestir Sven Krarup Nielsen at enda.

# Mugu hava skaðanevnd

**– Nú eri eg enn meiri sannførd um, at ein føroysk skaðanevnd má koma. Tað er alneyðugt, at vit fáa kannað hvørja vanlukku sær, soleiðis at vit gerast betri til fyribyrgjandi arbeiðið, heldur Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd**

FERÐSLUTRYGD
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

í fyrilestrinum, sum hann helt, kom formaðurin í donsku skaðanevndini, Sven Krarup Nielsen, m.a. inn á, hvussu stóra ávirkan danska skaðanevndin hevur havt á tryggleikan á donsku vegunum. Til hvørja álvarsama ólukku ella vanlukku verða teir fráboðaðir, og gera so eina djúptgangandi kanning. Út frá upplýsingunum, teir fáa, gera teir síðani hagtøl og tilmæli. Nógv av tilmælunum eru blivin fylgd, og hava harvið bøtt munandi um ferðslutrygdina.

Men í Føroyum er eingin tílík ferðsluskaðanevnd, ið kannar ólukkur og vanlukkur, hóast Ráðið fyri Ferðslutrygd í fleiri ár hevur gjørt vart við tørvin.

### Skaðanevnd er alneyðug

Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Feðrslutrygd, er, eftir fyrilesturin, enn meiri sannførd um, at ein slík nevnd er alneyðug her á landi.

– Tað, at teir fara inn og gera djúpar kanningar av hvørji einstakari vanlukku sær, og síðani kunnu gera konkret tilmæli og hagtøl, hevur havt stóran týdning fyri donsku ferðsluna.Og hetta manglar veruliga í Føroyum, slær Rúna Sivertsen fast.

Hon sigur, at hon kennir seg aftur í tí, sum Sven Krarup Nielsen legði fram, um høvuðsorsøkirnar til vanlukkurnar. Størstu vandarnir eru teir somu í Føroyum sum í Danmark, m.a. vantandi trygdarbelti ella ov høg ferð.

– Men tað er so ómetaliga nógv, sum føroyingar ikki vita, eftir at ein ferðsluvanlukka er hend her heima, tí ongar umfatandi kanningar verða gjørdar. Um vanlukkur henda á sjónum, fer ein skaðanevnd og kannar alt, men tað verður ikki gjørt á landi, og tað ger, at tað er nógv, sum vit ikki vita, sigur Rúna Sivertsen.

### Politiskur óvilji

Spurd, hvar ynski um eina skaðanevnd strandar, svarar Rúna Sivertsen, at tað frá politisikari síðu ikki verður gjørt nóg mikið fyri at fáa nevndina á føtur.

– Tað tykist, sum um fólk hugsa, at »áh, ikki ein nevnd afturat. Vit hava nóg mikið av nevndum sum er«. Og vit vita eisini, at tað í løtuni verður gjørt nógv fyri at minka um almennu fyrisetingina, so hví seta eina nevnd afturat. Men man má duga á at skyna týdningin á nevndunum, vísir Rúna á.

Hon sigur, at ferðsluvanlukkur kosta føroyska samfelagnum útvið 200 milliónir kr. árliga, um øll oyðiløgd virði verða gjørd upp í pengum, eisini mannalív. Og hon hevur ógvuliga ilt við at góðtaka nakað argument ímóti at seta eina nevnd, ið kundi spart nakað av teimum 200 milliónunum, harímillum mannalív.

– 200 milliónir er jú ein óhugnaliga stór upphædd. Vit mugu seta inn við fyribyrgjandi arbeiði á teimum røttu støðunum, har tað veruliga ger ein mun, sigur Rúna.



Hon er sannførd um, at ein føroysk skaðanevnd er besta loysnin.

–Tað vísir seg so, at tað mugu kanningar og tøl til, áðrenn fólk taka ávaringarnar til eftirtektar. Tey trúgva teimum ikki, um tær ikki verða tengdar at tølum og kanningum. Vit mugu hava okkurt at vísa á, fyri at kunna siga, »tað er so, vit vita tað og vit hava tølini sum kunnu prógva tað«. Tástani gera ávaringarnar ein veruligan mun, sigur Rúna Sivertsen at enda.